Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 10.03.2020
Mál nr.: 0626-091/19
Málsviðgjørt: KTH

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1
Løgtingslóg um vápn v.m.	Løgtingslóg um vápn o.a.
§ 1. [...] *Stk. 3.* Tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella evna til amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2. [...]	**§ 1.** [...] *Stk. 3.* Tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella flyta út amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2. [...]
§ 2. Undantikin frá forboðnum í § 1 eru: [...]	**§ 2.** Undantikin frá forboðnum í § 1, stk. 1 eru: [...]
§ 3 a. Tað er forboðið persónum, ið ikki hava vápnaprógv, at flyta inn, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1.	**§ 3 a.** Tað er forboðið persónum, ið ikki hava vápnaprógv, at flyta inn, flyta út, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum, nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1.
§ 4. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um fráboðan og skráseting av teimum lutum og tilfari, sum koma undir §§ 1 og 2.	**§ 4.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um loyvi, fráboðan og skráseting av teimum lutum og tilfari, sum koma undir §§ 1 og 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar, sum eru skrásettir sambært 1. pkt.
	§ 2
	Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.